## Piotr skal venja B71

Síðani hann kom til Føroya í 1989 hevur Piotr Krakowski virkað sum spælari og venjari hjá hópin av føroyskum feløgum. Seinasti steðgurin hjá honum hevur verið í 07 Vestur, sum í ár mátti geva skarvin yvir í Vodafone-deildini,m en Piotr fer tó ikki niður við vágamonnum. B71 hevur nevnliga sett royna pólverjan í starv sum høvuðsvenjara hjá felagnum komandi ár, so á ein hátt kann sigast, at Piotr við hesum er vendur heimaftur.



## Keita bestur á Toftum

Leygarkvøldið hevði B68 ársveitslu, og millum tað, sum var á skránni, var eisini at finna fram til ársins B68-spælarar. Ikki óvæntað fall valið á Ahmed Keita, sum umframt at vera besti málskjúttin hjá B68 eisini var í uppskoti til heiðurin sum ársins spælari á gallaveitsluni, sum Miðlahúsið skipaði fyri. Í atkvøðugreiðsluni hjá B68 gjørdist Vlada Filipovic numamr tvey, meðan Jóan Símun Edmundsson gjørdist nummar trý.



Fyrst og fremst hevur Claus Rasmussen valt at byggja eitt lið upp við ungum spælarum. Men sjálvur avvísir venjarin ikki, at royndar kreftir eisini verða slúsaðar inn á liðið

Mynd: Álvur Haraldsen

### Føroyar-Grønland 25-24 (9-9):

# Eitt spennandi kvinnulandslið

**Føroyska U-landsliðið fekk fína dystarvenjing – og ein sigur – tá tær sunnudagin spældu fyrsta av fýra venjingardystum móti Grønlandi**



jakup@sosialurin.fo

Jákup Mørk

Fram til mikudagin spælir føroyska kvinnulandsliðið fýra dystir móti Grønlandi, og skal metast eftir fyrstu uppgerðini, so verður talan um framúr dystarvenjing.

Sunnudagin gekk dysturin nógv aftur og fram, men størsta partin vóru tað kortini okkara, sum vóru við yvirlutan.

Fyrst og fremst var hugaligt at síggja, at hóast føroyskur kvinnuhondbóltur í dag er soleiðis, at útlendskir spælarar ofta hava hug at trýsta føroysku spælararnar frá bakkplássunum, so var skotstyrkin á føroyska liðnum so heilt hampuliga góð. Og tá gongd kom á skjótálopini móti dystarenda, hóttu okkara eina løtu við veruligum stórsigri.

Ein trupulleiki í verandi løtu er tó, at royndirnar á føroyska liðnum ikki eru tær heilt nógvu, og tí var kortini um reppið, at sigurin varð tveittur burtur. Grønlendska liðið slapp at gera dystin meira spennandi, enn gott var, og seinasta minuttin høvdu okkara tvey álop, sum vórðu endað alt ov skjótt. Tá tað seinasta av hesum var misnýtt, vóru sekundini á talvuni kortini somikið fá, at grønlendska liðið ikki av álvara fekk stundir at seta eitt álop í lag.

Dystirnir hesa ferð eru fyrstu dystirnir hjá "nýggja" føroyska liðnum, sum fyrst og fremst verður bygt á ungar spælarar. Ein av komandi avbjóðingunum er Challenge-Trophy kappingin í vár, og enn hevur Claus Rasmussen ikki gjørt av, um hann til ta tíð tekur fleiri av meira royndu kreftunum inn á liðið.

## Bar Merkið um málið á Hawaii

**Karina Ottosen gjørdist nummar 547 av øllum og tann sætt-besta í sínum bólki, tá hon í gjár kappaðist í Ironman á Hawaii**

Karina Ottosen kom sum fyrsti føroyingurin nakran tíð um málið á stóru Ironman-kappingini, sum hvørt ár verður hildin á Hawaii. Rættin at taka lut í kappingini vann hon, tá hon í summar tók lut í kapping í Onglandi, og leygardagin fór hon sum fyrsti føroyingurin nakran tíð undir avbjóðingina á einum av heimsins mest víðagitnu kappingum.

10 tímar, 33 minuttir og 15 sekund seinni hevði Karina vunnið seg tum teir teir 3,8 kilometrarnar við svimjing, 180 kilometrar á súkklu og marathon-teinin í renning.

Sjálvt um hitin var oman fyri tey 30 stigini, so var Karina væl fyri, tá hon kom um málið. Og umvegis teldubræv letur hon frætta, at kenslan í kroppinum hesa ferð helst var betur, enn tá hon kappaðist í Onglandi í juli mánaði.

**Jákup**



**Hóast Karina er skrásett sum danskur íðkari, so bar hon Merkið við, tá hon sum fyrsti føroyingurin nakran tíð kom um málið í Ironman-kappingini á Hawaii**

## Fakta um dystin

**Føroyar-Grønland 25-24 (9-9)**
**10 min:** 2-3
**20 min:** 7-5
**40 min:** 15-13
**50 min:** 20-17
**Málskjúttar**
**Føroyar:** Liljan Djurhuus 6, Durita Mikkelsen 5, Durita Ljósstein 4, Bára Berthelsen 3, Edith Hansen 2, Marjun Danbergb 2, Ninna K. Johansen 1, Halla Midjord 1, Bára Danielsen 1
**Grønland:** Ivana Holm 5, Mia Rasmussen 4, Naasunnguaq Tremel 3(3), Nivi Wille 3, Ulla Kleist 2, Bonna Berthelsen 2, Lykke Hansen 2, Hanna Millik 1, Line Thomsen 1, Najaaja Lyberth 1
**Brotskøst:** Føroyar 1, Grønland 3
**Útvísingar:** Føroyar 3
**Dómarar:** Birgir Sondum & Thomas Juul Thomsen